# Hjálparfólk søkist

Dagrøktarskipanin í Sjóvar kommunu, sum er normerað til 65 pláss, søkir eftir hjálparfólki at arbeiða 20 t. um vikuna, at byrja 18. august 2003.

Arbeiðsuppgávurnar eru m.a. í samstarv við leiðaran av dagrøktarskipanini
- at samskipa virksemið í spælistovuni
- vitja dagrøktarheimini regluliga

Vit ynskja, at tú:
- **helst hevur pedagogútbúgving**
- hevur royndir innan dagstovnaøkið
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- ert virkin, røkin og hevur lætt við at samstarva
- hevur áræði at skapa umstøður, har børnini gleðast, trívast og mennast.

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og FKA.

Meir fæst at vita um starvið, við at venda sær til Sonlis S. Høj Joensen, dagrøktarleiðara, tlf. 449445 ella 219445.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum, skulu verða Dagrøktarskipanini í Sjóvar kommunu í hendi í seinasta lagi 12. august 2003.

**Dagrøktaskipanina í Sjóvar kommunu**

FK Dr. Jakobsensgøta sóknast eftir

# handilslærlingi

at byrja 1. september 2003.

**Krøv/útbúgving:**
FHS: 3 ára lærutíð
HH: 2 ára lærutíð
Student/HF: 2 ár og 18 vikur

Vit bjóða einum røskum fólki – drongi ella gentu – við dirvi og áræði, eina útbúging undir skipaðum viðurskiftum í einum handli, har lív er í.

Arbeiðstíð: 40 tímar um vikuna, frí annan hvønn leygardag.

Nakrar ferðir í lærutíðini verður farið á skeið í Danmark.

**Okkara krøv:**
Fyrikomandi, kundavinarligur, røkin, góð samstarvsevnir.

**Løn:**
Sbr. S&K sáttmálanum.

**Umsókn:**
Skrivlig, saman við próvtøkuskjali. Skal sendast í seinasta lagi 16. aug. 2003, merkt. *Lærlingur*.

Aðrir upplýsingar fáast við at ringja tlf. 311320 ella 217593, Bo Møller.

**Keypssamtøkan**
í Dr. Jakobsensgøtu
Boks 349
FO-110 Tórshavn

FØROYA LANDSSTÝRI

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúastarv til Fíggjarmálaráðið

Søkt verður eftir einum fulltrúa til Fíggjarmálaráðið. Sum fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum kemur tú at arbeiða við sera fjøllbroyttum úrvali av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum uppgávum á teimum økjum, ið ráðið umsitur. Dømir:
- Tú ráðgevir landsstýrismanninum um fíggjar-, skatta- og avgjaldsmál og viðgerð innkomin mál
- Tú fyrireikar uppskot til nýggjar lógir og lógarbroytingar
- Tú loysir tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Tú ger analysur, langtíðarætlanir og tryggjar, at hesar verða framdar
- Tú ráðgevir og leiðbeinir aðalráðum og stovnum

**Førleiki**
Vit rokna við, at tú hevur samfelagsvísundaliga útbúgving av hægri lærustovni. Vit rokna eisini við, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva í arbeiðsbólkum.

**Vit bjóða**
- Sjálvstøðugt starv, sum tú í stóran mun skapar sjálv/ur
- Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú arbeiðir nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgving
- Flex-tíð
- Eitt starv, sum til tíðir kann vera krevjandi, men sum samstundis er sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, og tí eru sera góðir møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

**Setanartreytir**
Setunartreytir og løn eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fatar um alt Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini.

**Umsókn**
Umsókn saman við CV og møguligum viðmælum skal sendast til:

***Fíggjarmálaráðið***
***Postboks 2039***
***FO-165 Argir***

Frestin at søkja er **mánadagin 18. august 2003 kl. 12.00.** Starvið verður sett skjótast tilber.

Vilt tú vita meira um starvið, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmála-stjóra, á tlf. 35 20 20.

Lýsingin finst eisini á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum: www.fmr.fo. Telduposturin er fmr@fmr.fo

*Fíggjarmálaráðið heldur til úti á Argjum saman við Føroya Gjaldstovu, Stýrinum fyri Toll- og Skattstovu Føroya, Hagstovu Føroya og Lønardeildini. Sostatt arbeiða rættiliga nógvir búskapar- og løgfrøðingar undir sama taki í Fíggjarmálaráðnum.*

# Frá Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá, at komandi viðgerðartúrur til Bláa Lónið verður frá 26.09. til 24.10.2003.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, verða biðin um at fara til egnan kommunulækna. Læknin fyllir umsóknarblað út og sendir tað til húðlæknan.

Umsóknin skal latast inn í seinasta lagi 15.08.03. Um ivaspurningar eru hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja á tlf. 424179.

# Skeið til krana D 8-25 TM

**byrjar mikudagin 6. august kl. 19.15.**

Tilmelding á tlf. 318821 ella 218777.

Avmarkað næmingatal.

**Sp/f KOYRIKORTIÐ**

# Læknaskrivari

Til eina av viðtalum okkara verður søkt eftir avloysara hálva arbeiðstíð at byrja beinanvegin.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sólfríð Olsen á telefon 410000.

**Klaksvíkar kommuna**
Postboks 2 · FR-700 Klaksvík
Tlf. 410000 · Fax 410001

# Koyrikort til persónbil

Nýtt skeið til persónbil byrjar
**mikudagin 6. august 2003 kl. 17.30**
á Tórshavnar Trafikkskúla,
Slættanesgøta 5, Tórshavn.

Tilmelding á tlf. 573940 ella 318821

**HAMMERS' KOYRISKÚLI**
v/ Johannus Hammer

www.sosialurin.fo



ÚTSØLAN BYRJAR
MÁNAMORGUNIN
4. AUGUST
KL. 09.00

Allar útsøluvørur
-50%

VOGUE
M. Heinasonargøta 23 - Tlf. 312380

P/F hjá KISSA
Tórsgøta • 100 Tórshavn • Tel. 31 13 95

Wrangler SHOP
N. Finsensgøta 23 Tel. 31 47 10